## Minningarorð um pápa okkara

# Kristin Holm, Nólsoy

17. desember fer at vera ein dagur, sum vit ongantíð fara at gloyma.

Sunnumorgunin vóru vit uppringd, tíðliga á morgni, tí babba var vorðin sjúkur. Fóru til Havnar á Landssjúkrahúsið við honum, men eingin av okkum hugsaði, at tað stóð so illa til, at hann lítla løtu seinni var deyður, bert 59 ára gamal.

Tað var sum um beinini fullkomuliga vóru skrykt undan okkum, ein djúp óskiljandi sorg. Babba var jú ungur og púra frískur, alt var so óveruligt og so tað, at eingin lækni kundi hjálpa honum. Hetta var beint undan jólum, og vit høvdu beint áðrenn avgjørt, at í ár skuldu vit øll systkini við familju halda jól heima hjá mammu og babba, tað var jú altíð so hugnaligt. Ístaðin blivu hetta eini jól við stórari og tungari sorg.



Góði babba, tú og mamma skuldu halda 35 ára brúdleypsdag, og høvdu tit tosað um hendan dagin, sum var 2. jóladag. Tað var so hugnaligt at koma til tykkum tann dagin, men so skuldi ikki verða, og vit standa eftir spyrjandi, hví?

Góða babba, tú vart eitt so deiligt menniskja, og eru vit so eydnusom at kunna vera ein partur av lívi tínum. Ein so róligur maður sum altíð var til at heita á, at hjálpa við øllum. Tú og mamma vóru so ung tá tit komu saman, altíð góð, tit vóru sum ein greipa. Har mamma var, var eisini babba.

Babba var sjómaður, tá vit vóru smá og minnast vit væl, tá hann kom aftur við Kapilssund og hevði verið leingi burturi, hvussu spennandi tað var, tí altíð hevði hann okkurt heim við til okkara.

Vit lærdu nógv gott av tær, bæði tá tú var eftir fugli, og eisini tá tú vart í haganum. Minnini eru nógv.

Ofta sat tú og sang og kvæði saman við okkum, tað vóru ikki fáir sangir í Føroya fólks og sálmabókini sum tú dugdi og lærdi okkum.

Mamma sigur ofta, at tað var næstan hvønn dag tú segði, hevur tú snakka við Heidi í dag? Er Poula í Havn? Hevur tú sæð Mikkjal? At vita hvussu góður tú vart við okum, gevur okkum eina styrki til at liva víðari.

Kann minnast hvussu tú plagdi at ringja til Havnar og siga »Hey, tað er babba, eg eri í haganum, siti uppi á oynni og fái mær drekkamunn, so eg ringdi bara fyri at vita, hvat tú gert. Havi kikara við, so eg síggi húsini hjá tykkum«.

Átta abbabørn fingu stóra gleðu av tær, og føldu vit at tú ynskti at gleða tey, eins og tú gjørdi við okkum, tá vit vóru smá, tað eru vit glað fyri, og at tey hava fingið nógv og góð minnir saman við tær.

Ofta hugnaði tú tær saman við svigarsynunum, tað dámdi tær og teimum væl, bæði heima, í haga og annars við tí tú vart upptikin av. Tit høvdu seyð í fjósinum, sum tú segði, so høvdu vit okkurt at gera um veturin.

Tá tú nú vart vorðin umsjónarmaður í Nólsoy, hevði mamma fingið ein mann, sum altíð var heima til døgurða, og sum eisini bara kom inn og spurdi um ein kaffimunnur var klárur, so mamma, vit skilja væl, at tú følir eitt stórt tómrúm.

At tú vart ein maður, sum øll hildu av, tað sóu vit tá tú fórt av kapellinum, ein stóran fólkaskarða, eisini í kirkjugarðinum.

Mamma tú skalt vita, at vit altíð eru har. Tað er ómetaliga hart.

Vit eru uppvaksin við at trúgva á Jesuspápa og vita at hann er har, tað er ein troyst, og at tú ert heima hjá honum, er gott at vita sær.

Hervið vilja vit lýsa frið yvir pápa okkara.

Takk fyri nógv góð minnir.

**Heidi, Poula og Mikkjal**

# Øssur Berghamar 65 ár



Í dag, týsdagin 13. februar 2007, fyllir Øssur Berghamar, leiðari av Kristnastovu í Keypmannahavn 65 ár.

Øssur er havnarmaður, men hann hevur búð í Keypmannahavn síðan 1973. Hann er útbúgvin skrivstovumaður og hevur t.d. arbeitt í Sjóvinnubankanum, á skrivstovuni á Landssjúkrahúsinum og á eini bilasølu í Havn.

Í 1970 giftist hann við Susan, ið er fødd og uppvaksin í Hounslow uttan fyri London.

Í 1973 fluttu tey til Keypmannahavnar, har tey byrjaðu eitt evangeliskt útisetaverk millum føroyingar. Hetta var byrjanin til tað, ið vit kenna sum Kristnastova, har nógvir føroyingar koma.

Foreldrini hjá Øssuri vóru: Tinna, f. Hansen, av Toftum, og Sigurd Berghamar úr Havn. Øssur eigur tríggjar systrar: Gunnvør, sum er eldri enn Øssur, og Rúna og Erla, sum eru yngri enn hann. Tær búgva allar í Havn.

Susan og Øssur eiga tveir synir, Andrew og Kristin Filip, sum báðir búgva í Danmark.

Barnabørnini eru seks í tali.

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

## Andlát og jarðarferðir

**Maria Petursdóttir, fødd Hentze, ættað úr Hovi**, búsitandi í Hafnafirði í Íslandi, andaðist fríggjadagin 9. februar 77 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hafnafjarðar kirkju hósdagin 15. februar klokkan 11. Tey, sum vilja minnast Mariu kunnu lata eina gávu til Hovs kirkju, konta í Suðuroyar Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum við fjarritum, blómum, vitjan og uppringingum mintust okkum á krúndiamantbrúdleypsdegnum 30. januar 2007.
Ein serlig heilsan til tykkum á Mørkini í Streymnesi og børnini við familjum, takk fyri at tit gjørdu okkum dagin so hugnaligan.

**Blíðar heilsanir**
**Jona og Esmar Dahl, Oyri**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá okkara høgt elskaði sonur og bróðir

**Jón Magni Hentze**

so brádliga varð tikin frá okkum.
Takk fyri vøkur orð frá Sverra Steinholm í kapellinum á Landssjúkrahúsinum og takk til tykkum øll, sum vóru har.
Stóra tøkk til Jónsvein Bech fyri vøkru og fjálgandi orðini í Tvøroyrar kirkju og tøkk til vinirnar hjá Magna, sum bóru hann.
Hjartans tøkk fyri stóru hjálpina við jarðarferðina og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til øll, sum ringdu og vitjaðu við troystandi orðum.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Guds friður veri við Magna.

**Jonhild, Jens Thorolf og Petur**

**Dagurin**

**14. februar. Valentinus.** Fleiri halgimenni bera hetta navnið. Í angulsaksiskum londum, serliga í Amerika, senda gentur og dreingir hvør øðrum gávur ella skrivligar ástarkvøður, valentines, á hesum degi. Navnið er latín og merkir raskur ella kraftarmikil. Jens Kristian Svabo doyði hendan dagin í 1824, 78 ára gamal.